# Tað søgdu tey eftir Hannover

**Sum framhald av grein frá týska-føroyska vinarfelagnum í blaðnum í gjár, prenta vit í dag grein frá einum øðrum føroyavini. Nevnliga Louis Wilson, sum er búsitandi í Onglandi, men sum eisini var staddur í Hannover í fjør heyst:**



## MEMORIES OF AN AUTUMN NIGHT IN HANNOVER

Tonight at Torsvøll one must hope that the Landslið can carry on exactly where they left off last October in Hannover. They left the field in triumph as the whole stadium rose as one to applaud their heroic efforts. In the last few minutes of the match Hjalgrim Elttør found himself one on one with Oliver Kahn after sharply latching a headed flick from John Petersen. He slotted the ball wide of the giant goalkeeper only to agonisingly see it hit the post. The shock of this incident silenced the German fans as well as their Oompah Band while the Faroese fans gave voice to their feelings with a rendition of "Tú Alfagra Land Mítt" that resounded through a now otherwise silent stadium.

This was the climax of an unforgettable night of drama, spectacle and emotion. Here were the tiny Faroe Islands taking on mighty Germany for many years a dominant power in International football and runners-up in the recent World Cup finals. Moreover Germany were playing in there own backyard with 35,000 supporters expecting them to provide a goal feast. And this is exactly what one feared when they scored from a penalty awarded in the first minute after some desperate defending by Oli Johannesen. But this is when the Faroese team showed their strength of character. There was no panic or lack of confidence. They remained well organized and started to settle into a rhythm and launch some attacks of their own. They were urged on by their supporters whose chants of "Føroyar _ Føroyar" became more insistent as the match wore on. A whole forest of Faroese flags were being waved and the effect of this was magnified when the spectacle was shown on the giant screen in the opposite corner of the stadium.

We had the equalizer before half time and then Klose putting Germany ahead again. This seemed to stir the Faroese into being even more attack minded. Instead of the sort of damage limitation they would have resorted to in previous years they had the confidence to attack and go for an equalizer. This was the same spirit shown when they pressed for a winning goal against Scotland the previous month. Germany remained dangerous throughout but they were prevented from scoring by an inspired shot stopping performance by Jákup Mikkelsen which had the German papers unanimous in acclaiming him as man of the match the following morning.

So here we had the Landslið taking on the might of Germany in a game of open football and coming within a few millimeters of a draw. This enhanced the growing respect for the Faroe Islands in the Football World. They are no longer seen as a pushover or a novelty team to be patronised but serious opponents who are capable of giving any other national team a difficult time. If they draw on the qualities they showed in Hannover and maintain their concentration and discipline there is every reason to hope that they can further add to that reputation tonight especially against a German team seemingly short of confidence after their 1-1 draw with Scotland.

Ein mynd úr Frankfurt am Main

# -Ein hugleiðing

**Kim Simonsen**
*(Frankfurt am Main)*

Her eru smáir týskir býir, óendalig fjøll, myrkir skógir og framvið motorveginum her í Hünsrück eru campingpláss. Útvarpið tosar um dystin í dag móti die Färöer in Torshavn við longu brotum úr bløðunum um hvat ballack og Kahn hava sakt um dystin í Skotlandi.

Tað er løgi at koyra gjøgnum landslagið í dag. Sólin er øgilig tað eru 29 hitastig og í morgin verða eini 33 hitastig. Bussførarin er ikki ein dag eldri enn 20 ár. Líkist einum persóni úr The Matrix við hasum sólbrillunum. BMW og Mercedesbilar koyra 180 og 200 framvið. Vit eru nú uttanfyri stórbýin Frankfurt am Main. Her eru trý spor hvørju megin og ongin avmarking av ferð.

Her í hesum økinum í Hünsrück liggur Schabback, ið er býurin í sjónvarpsrøðini Heimat, ið snýr seg um eina vanliga familju í hesum økinum frá 1917 til 1962. Hendan røðin, ið er gjørd av Edgar Rietz er ótrúlig. Maria er gift við Poul, hann hvørvir eftir fyrra heimsbardaga. til USA. Synir Mariu og Pouls fara í annan heimsbardaga. Annars er pilotur og hin tikin til fanga sum soldatur í Russlandi. Triði sonur Maria er Hermann, ið er ein kensluborin yrkjari og tónasmiðjur, ið hatar heimstaðin sum pestin. Hann forelskar seg í tænastukvinnuni hjá mammuni sum 17 ára gamal. Seinni í aðru røðini kallað Die zweite heimat, fer hann til München at lesa á Konservatoriunum har og møtir listafólki, tónleikarum og hópin av kvinnum. Hann vil ongantíð aftur til forbannaða heimstaðin, men lærir at München eisini er ein "heimat" ein heimstaður. Hetta er hin besta sjónvarpsrøðin eg havi sæð, ið sigur søguna hjá Týsklandi í 20 øld. og tey grefligu sár, ið enn eru á týsku fólkasálini.

Eg lesi eitt blað fyri og annað eftir um dystin. Á forsíðuni er Frankfurter Allgemeine eru annars vanlig tíðindi at Týskland er í kreppu, at tað ikki er so lætt longur at fáa týska búskapin at halda á.

### Munur á londum

Eg fleyg úr Svørríki. Tók tokið úr einum landi til eitt annað. Úr Keypmannahavn kom eg langt uttan fyri Malmø í Skåne, har øll ljóða sum tey hava ein frosk sitandi í hálsinum. Svøríki er eitt vakurt land, alt er so friðarligt og ófarligt á ein hátt. Kvinnurnar er ljósærdar og brosa. Tað er nærum vakurt á jarnbreytastøðini í Malmø, kanska er tað tryggleikin í svenska vælferðarsamfelaginum, ella eisini eru tey í Malmø nøkur bygdafrell. At koma úr Keypmannahavn, ið er stórur og larmandi, fólk eru stressað og líkjast arbeiðsnarkomanum, og enda í Malmø er nú løgi. Eg fann eitt flogfar og løtu seinni var eg í Frankfurt í Týsklandi. Hevði eg ikki veri her fyrr hevði eg fingin ein mentunarskelk. Her eru eingi bros, alt er brotið og lítið hugnaligt er á jarnbreytastøðini. ein dummur hundur skuldi hava 53 Euro fyri eina billet til Stuttgart. Javel DB – Deutches Bahn – er helst eisini í kreppu og hevur sett prísin í loft.

Sama dagin siti eg í oysregni og lesi Die Zeit. Tey flyta bert innum um tað regnar her. Her drekka tey Apfelwein við mineralvatni, eina Hefe Wiesse øl og eta stórar Bretzel, ið er sum ein stór kringla, ið smakkar av salti og syru, og egnar seg ótrúligani væl til øl.

Í gamla býarpartinum í Frankfurt am Main sita fólk við long borð. Á hesum eplavínbryggjaríinum á Grosse Ritterstrasse 49 stendur tíðin still í tí annars so ótrúliga ríka og modernaða Frankfurt. Býurin liggur vakur við Main ánna, men er vandamikil, hóttandi og skítfullur av narkomanum, horum, hustlarum og desperatum. Vit eru í Miðeuropa og langt frá Norðanlondum. Tey ólukkuligu eru eins vanlig sum tey ríku, við stórum bilum, tí hetta er stórsti bankabýurin í Europa, har er ein stór getto av ríkum fólkum.

Her í hunaligu barrini sita tey og hugna sær, her minnir um køkin hjá Katrine, ið er kona Grisehandler Oluf Larsen í Matador. Tað er sum um tíðin hevur staðið still her í 85 ár. her sita ung og eldri, eingin tónleikur. Tey drekka av ljósum gulum gløsum við eplavíni, ella cider sum vita kalla tað. Ovast á matarkortinum her eru rættir sum: "Frankfurter Würtchen", "Brautwürst mit Sauerkraut" og eitt hav av ymiskum Schnitzels. Hetta ljóðar gamalt og týskt, men eg haldi hetta er í ordan í dag. Júst á hesum stað eru tey stolt av teirra mentan. Her er okkurt ektað, í mun til turkiskar pissabarrir, kebap fastfood, Mac Donalds, kinverskar keðiligar súr og søt sós støð. Tað er sum um matarmentanin í øllum Norðureuropa er horvin og vit bert sita og eta kopi italienskan mat, feitan amerikanskan mat og svansi hjá arabarunum, ið er bíligt, men oftani vánaligt. Her hava tey gott vín og ótrúligar øl, nakrar av heimsins bestu. Hvat tørvar hjartanum annað eitt slíkt kvøld í Frankfurt?



»Eg síggi teg, hoyri teg - og góðtaki teg!«

# Hirðar í Viðareiðis skúla




*Marjun er hirðovasti í bólkinum »Hirðin«. Fríggjadagin vóru hon og hini í bólkinum og vitjaðu flokkarnar, og greiddu frá hirðatænastuni*

**Á Viðareiði hava tey sett sær fyri, at happing skal burtur úr skúlanum. Til at røkka hesum máli, hava tey skipað ein bólk, ið verður nevndur »Hirðin«. Tað eru næmingar úr 5., 6. og 7. flokki, sum hava fingið litið ta stóru ábyrgd upp í hendur at vera hirðar hjá sínum skúlafeløgum. Aftrat næmingunum, er eitt umboð fyri lærararnar, eitt fyri foreldrini og skúlaheilsusystirin í hirðabólkinum**

## SKÚLI OG TRIVNAÐUR

*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Í heyst gjørdu tey á skúlanum á Viðareiði eina trídeilda endamálsorðing, har trivnaður er raðfestur ovast. Síðani koma læring og umhvørvi.

- Skulu børnini læra, mugu tey fyrst og fremst trívast, sigur Anita Køtlum Petersen, skúlaleiðari.

Við hesum í huga varð farið undir eina virkisætlan móti happing, við loysunarorðinum, »Eg síggi teg, eg hoyri teg - og góðtaki teg!«

### »Hirðin«

Síðani varð gjørd ein ætlan fyri ein bólk, ið skuldi hjálpa til at fáa happingina burtur úr skúlanum. Bólkurin fekk navnið, »Hirðin«.

- Hirðin virkar fyrst og fremst eftir meginreglum skúlans, sum eru trivnaður, læring og umhvørvi og eftir virkisætlanini móti happing: Happing ÚR Viðareiðis Skúla.

Við hesum grundarlagi verður farið undir at stovna ein bólk, sum hevur sum aðalmál at stríðast ímóti happing og antisosialum atburði. Við antisosialum atburði verður sipað til atburð, sum á allan hátt brýtur niður samfelagið, sum er millum næmingar, lærarar, skúla og heim, stendur millum annað í ætlanini fyri »Hirðan«, sum varð góðkend á stýrisfundi 14. mai.

### Ung við ábyrgd

- »Hirðin« er settur av 4 næmingum; 1 úr sjeynda flokki, 2 úr sætta flokki og 1 úr fimta flokki. Orsøkin til hetta er, at sjeyndi flokkur er elsti flokkur á skúlanum, og er tann flokkur, sum fer fyrst. Tí er best, at sætti flokkur er best umboðaður, og kanska eisini hevur næmingaformannin.

Tá næmingarnir úr sætta flokki fara í sjeynda, fáa tey eina størri vegleiðandi ábyrgd í »hirðanum«, tí tey hava nakrar royndir frá árinum fyri, og hava tá eitt innlit í viðurskifti, sum hirðin hevur verið fyri.

At hava eitt umboð úr fimta flokki kann tykjast ov brátt, men verður hugsað um møguleikarnar, sum standast av at geva einum næmingi ábyrgd tíðliga í hansara skúlalívi, kann tað vera við at menna barnið sum næming og fólk, siga tey á skúlanum.

Umframt næmingarnar eru eisini trý vaksin í hirðabólkinum, ein lærari eitt foreldur og skúlaheilsusystirin.



*Stendur tað til hesi børnini, verður happing ikki longur at finna í skúlanum á Viðareiði. Genturnar eru frá vinstru: Maria, Jonhild, Marjun og Margit. Dreingirnir eita Esmar og Absalon*

### Geri tað við gleði

Maria er ein av næmingunum, sum er vald í hirðabólkin.

- Eg geri tað við gleði, tí eg veit hvat tað er at verða happað, sigur hon.

»Hirðin« er demokratiskt samansettur. Næmingarnir stillaðu valevni til bólkin, sum síðani varð valdur. Á sama hátt stillaðu lærararnir sítt umboð, og foreldrabólkurin stillaði eitt foreldur.

At stilla upp til »Hirðan« er eitt álvarsmál - bæði fyri vaksin og børn. Tað skal ikki verða tikið lætt. Við arbeiðinum fylgir ábyrgd - og álit.

Tað er ikki bara sum at siga tað, at verða valdur til hirða. Fyri tað fyrsta hevur hirðin tagnarskyldu, og umframt tað, skal hann ella hon hava ávísar eginleikar.

Í gerandisdegnum eru hirðarnir tó fyrst og fremst vanligir næmingar. Tey hava fingið eina uppgávu, ið kann samanlíknast við til dømis tað at vera umboð í næmingaráðnum.

### Eygu, oyru og hjartalag

Tey, sum eru vald til hirðar, eru børn við hjartalagi og serligum eginleikum at eygleiða. Flestu teirra kenna á egnum kroppi, hvat tað vil siga at verða happaði.

Trý av teimum eru komin inn í lærarstovuna at greiða frá hirðatænastuni.

- Vit skulu duga at síggja og hoyra - og vit skulu vera viljug at nýta ta tíð, sum tað krevur at vera hirði, sigur Marjun, sum er hirðovasti.

Tey halda ikki at ábyrgdin er ov stór, tí tey hava vaksin fólk aftrat sær, sum tey altíð kunnu koma til.

- Enn hevur hirðabólkurin bara virkað í fáar dagar, men vit síggja longu, hvørja positiva ávirkan eitt slíkt arbeiði hevur fyri skúlan, sigur Anita.

Hirðabólkar eru kendir aðrastaðir, m.a í Svøríki hava tey góðar royndir við slíkum bólkum.

### Eitt stað fyri øll

Umframt at fáa happingina burtur, fer hirðabólkurin eisini at virka fyri, at Viðareiðis skúli verður eitt betri stað fyri øll - og at viðurkenna at øll eru ymisk og hava rættin til at vera tað.

Vilt tú vita meir um »Hirðan«, far so á heimasíðu skúlans, www.skulin.fo/vid